

# Julian fer eftir meistaraheitinum

**Føroyski landsliðsleikarin, Julian Johnsson, og liðfelagar hansara í íslendska felagnum ÍA stremba eftir íslendska meistaraheitinum í ár, og teir tykjast eisini verða eitt gott boð upp á meistaraheitið**

**Terji Nielsen**
*terji@sosialurin.fo*

Hann er ein av teimum føroysku leikarunum, ið hevur drúgvast royndir frá útlendskum kappingum. Julian Johnsson hevur áður leikt við norsku feløgunum Kongsvinger og Sogndal, og eisini hevur hann roynt seg í enska felagnum Hull FC. Nú er Julian í Íslandi, har hann við felagi sínum, ÍA av Akranesi, miðjar móti íslendska meistaraheitinum.

## Gott lið og breiðan hóp

Í fjør gjørdist Julian íslendskur steypavinnari við ÍA, og hóast teir leingi vóru í niðurflytingarvanda, eydnaðist tað ÍA við einum øgiligum endaspurti at berja seg upp á triðjaplássið í kappingini, bara trý stig aftan fyri meistararnar úr KR.

At ÍA eisini hevur ein møguleika fyri at vinna meistaraheitið í ár, er einki at siga til, tí herfyri leiktu teir árliga dystin millum steypavinnnarar og meistarar, og tá vunnu Julian og liðfelagar hansara sannførandi 3-0 á íslendsku meistarunum. Julian sigur, at teir bart út spældu KR av vøllinum í tí dystinum, og slíkt gevur sjálvsagt blóð upp á tonna.

Hópurin hjá ÍA er ikki broyttur nakað serliga í mun til seinasta kappingarár, men tað ger einki, heldur Julian Johnsson, tí teir hava eitt kompakt lið, og hópurin er breiður.

Julian og liðfelagar hansara venja fimm ferðir um vikuna, og áðrenn kappingin fer í gongd, verður eisini farið á venjingarlegu. Tá verður farið til Týsklands, har teir millum annað skulu leika venjingardystir móti eykaliðunum hjá VFL Bochum og Borussia Dortmund.

Seinni í ár skal ÍA taka lut í UEFA Cup, og í íslendska feløgunum vóna tey, at tað fer at eydnast teimum at trekkja eitt norðurlendskt lið, og at sloppið verður undan at fara til Eysturevropa.

## Støðið eitt vet hægri enn í Føroyum

Um munin á íslendskum og føroyskum fótbólti sigur Julian Johnsson, at í Íslandi spælir kropsstyrkin ein nógv størri leiklut, enn hon ger í Føroyum. Harafturat eru hóparnir hjá teimum íslendsku feløgunum størri enn í Føroyum. Eisini heldur Julian, at í Íslandi eru ikki so nógvir profilar, men at spælararnir eru meiri javnt góðir.

Julian Johnsson hevur verið eina tíð í Íslandi nú, og hann sigur seg trívast væl. Um veturin, áðrenn fótbólturin byrjar av álvara, arbeiðir Julian á einum maskinverkstaði, tí annars høvdu dagarnir verða øgiliga langir, sigur hann. Í fyrstuni var Julian einsamallur í Íslandi, men so skjótt tað gjørdist greitt, at hann fekk eina longri avtalu við ÍA, flutti familjan eisini yvir.

Hvussu leingi Julian verður í Íslandi, dugir føroyski landsliðsleikarin at siga, tí hann sigur seg taka eitt ár í senn, og so vil tíðin vísa, hvat ið fer at henda, sigur Julian Johnsson.

# Fyrimunur at vit eru tveir

**Í vetur skiftu bæði Fróði Benjaminsen og Hans Fróði Hansen úr B68 til íslendska felagið Fram, sum hevur tann í Føroyum so navnframa rumenan, Ion Geolgau, sum venjara**

**Terji Nielsen**
*terji@sosialurin.fo*



*Hvørki Hans Fróði Hansen ella Fróði Benjaminsen hava fingist við nakað annað enn fótbólt, síðani teir eru komnir til Íslands*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað var ein dyggur smeitur hjá B68 at missa tveir av sínum lyklaleikarum undan hesum kappingarárinum, men samstundis var avbjóðing sum teir báðir føroysku landsliðsleikararnir ikki kundu takka nei til.

## Góð útlit at sleppa á liðið

Fram hevur seinastu árini stríðst fyri at sleppa undan niðurflyting, men í ár er ætlanin at liggja eitt sindur longur uppi á stigatalvuni. Fróði Benjaminsen sigur, at hópurin hjá Fram er góður, og at nógvir ungir spælarar eisini halda seg til. Ikki er væntandi, at Fram fer at liggja heilt har frammi í oddinum, men kanska onkustaðni í miðjuni, sigur toftamaðurin í Fram. Sjálvur væntar Fróði Benjaminsen, at stríðið um íslendska meistaraheitið fer at standa millum núverandi meistararnir úr KR, og so steypavinnararnir úr ÍA við Julian Johnsson á liðnum.

Hjá føroyingunum báðum eru útlitini at vinna sær fast pláss á liðnum góð. Fróði Benjaminsen sigur, at Fram ikki hevur keypt teir til Íslands, so at teir kunnu sita á bonkinum, og alt bendir á at teir báðir fyrrverandi B68-leikararnir verða fastir menn á liðnum hjá Fram.

Hvørki Hans Fróði Hansen ella Fróði Benjaminsen hava fingist við nakað annað enn fótbólt, síðani teir eru komnir til Íslands, men Fróði Benjaminsen sigur, at eftir at Fram kemur aftur av venjingarlegu í Spania fyrst í apríl mánaða, er ætlanin at finna sær okkurt arbeiði.

Teir báðir føroyingarnir hava báðir konurnar hjá sær við til Íslands, og tey bæði føroysku húskini eru nærmastu grannar, og tað kemur væl við. Fróði Benjaminsen sigur, at tað avgjørt er ein fyrimunur, at teir eru tveir føroyingar, sum eru komnir til Fram í senn.

## Stórur dentur á tað kropsliga

Hóast hann enn ikki hevur havt møguleika fyri at fáa hollan kunnleika til íslendskan fótbólt, so heldur føroyski landsliðsleikarin, Fróði Benjaminsen, at støðið í Íslandi er eitt vet hægri enn í Føroyum. Fróði heldur, at íslendingar leggja størri dent á tað kropsliga, meðan føroyingar eru minst líka væl fyri sum íslendingar, tá ið tað ræður spælforstáilsi.

Av tí at so stórur dentur verður lagdur á tað kropsliga í íslendskum fótbólti, hava teir báðir føroysku landsliðsleikararnir eisini gjørt nógv við at vant styrkisvenjing um dagarnar, eftir at teir eru komnir yvir til Íslands.

Fróði Benjaminsen sigur, at nú verður bara bíðað eftir, at íslendska kappingin byrjar síðst í mai mánaða, og hann er sera spentur upp á avbjóðingina, ið liggur fyri framman hjá bæði honum og liðfelaganum Hans Fróða Hansen. Teir báðir hava undir øllum umstøðum góðar vónir fyri kappingarárið og ætla eisini at gera sítt til, at Fram ikki fer at stríðast fyri at sleppa undan niðurflyting í ár.



BANG & OLUFSEN



Bang og Olufsen
... so sæst tað!

**BeoLab 3 - nýggjur hátalari við miklari ljóðgóðsku**

*Tá talan er um ljóð, er nýggjasti hátalarin frá Bang & Olufsen einki minni enn eitt satt meistaraverk. Hátalarin er lítil, og tí er allastaðni pláss fyri honum, men hóast tað, er hann sera kraftar-mikil*

-Eg eri sera fegin um at vit nú kunnu borðreiða við okkara nýggjasta hátalara, BeoLab 3, sum hevur nógvar av tøkniligu dygdunum, sum okkara verandi hátalarar hava, m.a. okkara víðakendi BeoLab 5, sum altjóða faklig tíðarrit hava róst upp um skýggja. BeoLab 3 hevur tó fleiri fyrimunir, soleiðis at enn fleiri fáa gleði av hesi nýggjastu tøknini, sigur Torben Balle-gaard Sørensen, umsitingarleiðari hjá B&O.

Við BeoLab 3 hevur tú nógvar møguleikar. Hátalarin kann vera næstan hvar sum helst. Við fóti og upphangi, sum fylgja við hátalaranum, kanst tú hanga hann á veggin ella seta hann á eina hyll ella reól. Eisini kann hann, á einum aluminiumsfóti, setast á gólvið. Bæði hátalari og tilhoyrið hevur eyðkenda B&O sniðið, sum eingin fer skeivur av. Hetta ger seg sjálvandi serliga galdandi, um tú setir hátalaran á eitt sjónskt stað, men eisini ber til at hava hátalaran har lítið og einki sæst til hansara.

Við síni framkomnu tøkni, er BeoLab 3 sera vælegnaður bæði sum stereohátalari til tónleikaútgerðina annars, ella sum hátalari til heimabiografin, uppsettur sum surround sound.

Ein ógvuliga týðandi partur av sniðnum er ljóðskipanin oman á hátalaranum. Hugskotið við "Acoustic Lens Technology", sum tøknin verður kallað, er at geva størri møguleikar fyri hvar tú kann hava hátalaran, uttan at nakað fer av ljóðgóðskuni.

At fáa eina tílíka ljóðgóðsku úr so smáum hátalarum er bert møguligt við framkomnu B&O tøknini. Síðurnar á hátalaranum virka sum eyka, passivar hátalaraeindir, soleiðis at BeoLab 3 kann flyta størri luftmongdir, og við hesum eisini geva djúpari tónar, enn tað annars hevði verið møguligt í einum so lítlum hátalara. Innbygdu B&O ICE forsterkaraeindirnar tryggja neyð-ugu styrkjuna, uttan at lata eins nógvan hita frá sær sum vanligir forsterkarar gera.

Tað er David Lewis, fremsti sniðgevin hjá B&O, sum hevur givið BeoLab 3 snið. Umframt ljóðskipanina, so hevur hátalarin sama snið sum BeoLab 2, - ein sameining millum terning og kúlu. Hátalarahylkið er úr aluminium við kámari svartari yvirflatu.



BeoLab3: 10.395,- fyri hv.

*Avsláttur verður givin við kontantkeyp - fígging kann útvegast !*

HANDILIN
Hoyvíksvegur 53 · Tel 35 12 20